tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 83 Týsdagur 2. mai 2000 | 74. árgangur | www.sosialurin.fo | Kr. 10,00

## Forkvinnan í Lærarafelagnum fult álit á semjuni:

# Ikki fleiri slík verkføll í míni tíð

Forkvinnan í lærarafelagnum og landsstýrismaðurin í skúlamálum hava fult álit á, at eitt gott úrslit fer at spyrjast burturúr nýggja lærarasáttmálanum. – Tað, sum fekk glið á var, at Høgni Hoydal kom uppí, og at lærarafelagið hevði heimild at gera eitt sáttmála upp á standandi fót, sigur Elsa Birgitta Petersen

Síða 12



## FSF flytir landsdystir

Venjingarstøðan hjá landsliðsleikarunum var ikki nøktandi í Liktinstein, og nú roynir FSF at flyta landsdystirnar, sum skulu leikast komandi vár

Ítróttur síða 13-24



## Bussførari burturvístur

Óreglulig avrokning var orsøkin til, at ein bussførari hjá Bygdaleiðum varð sagdur úr starvi upp á standandi fót

Síða 4

## Sæborg tikin innanfyri

Skiparin tók við sektaruppskoti upp á 150.000 kr frá fútanum, fyri at hava fiskað á stongdum øki



Edvard Joensen

Tað kostaði skiparanum á Sæborg úr Leirvík 150.000 krónur at vera staddur ein góðan hálvfjórðing inni í kassa »i« á Mýlingsgrunninum, samstundis sum vaktarskipið Gorm kom framvið leygarkvøldið.

Manning av Gorm fóru umborð á Sæborg umleið klokkan 21.30, skiparin fekk boð um at fylgja við til Havnar, tí skipið trolaði innan fyri mark.

Skiparin fekk eitt sektaruppskot frá fútanum, sum hann tók við, og skipið kundi so fara avstað aftur.

Skiparin fekk 60.000 krónur í bót fyri at fiska ólógliga. Veiðan varð mett til 15.000 krónur og reiðskapurin til 75.000 krónur. Hetta slapp skiparin at keypa aftur.

At veiðan bert var mett til 15.000 krónur komst av, at túrurin var júst byrjaður, og tí var so lítið í lastini.

RADIO HANDILIN
v. Persson & Persson
Keyp ella leiga...
Tel. 31 82 77
N. Finsensgøta 16
FO-100 Tórshavn



Sjónvarp · Video · Stereo
Mikrofonskipanir o.m.a.
...vit hava egið verkstað

ABS TRANSPORT
Vørukoyring í Føroyum.
Flyting úr Føroyum til Føroya.
Goymsla og flytikassar.
Tilboð verða givin.
Lagaligir prísir!
Tel. 31 12 00

Út í heim við Atlantic Airways
Til Danmarkar í summar - frá 21. juni

Búgv t.d. á Feriecenter Kattegat




sum liggur bert 100 metrar frá havnini og strondini í Bønnerup. Svimjihylur inni og úti, spæliøki, matstovur og mong frítíðartilboð.
Prísir úr: 3.233,- + ferðaavgjald
fyri hvønn í 1 viku, um 5 fólk ferðast saman.

ella á Danland Søndervig




Liggur í Søndervig við Vesturhavið. Skamt frá Ringkøbing, uml. 1 tíma viðbili frá floghavnini í Billund. Á hotelløkinum eru matstovur, subtropiskt baðiland, hitarúm, solarium, borðtennis, billiard, vaskarí o.m.a.
Prísir úr: 3.098,- + ferðaavgjald
fyri hvønn í 1 viku, um 6 fólk ferðast saman.

- vit hava nógv onnur góð gistingartilboð til tín. Ring til Atlantic Airways og hoyr nærri um prísir og tíðir

SANSIR TEL 355355



Atlantic Airways
Tel 333 900